# Kaupthing hækkar rentu

Kaupthing Bank hækkar í dag allar innlánsrentur við 0,25%. Rentan verður tí framyvir: 3,25% fyri innlán undir 1 millión, 4,25 % fyri innlán yvir 1 millión og 4,50 % fyri innlán við 3 mðr uppsøgn. Bankin byrjaði fyrr í vár kappingina um innlánskundar og legði seg skjótt á odda við at bjóða kundum sínum bestu innlánsrentuna í landinum. Við hesi nýggju rentuhækkingini bøtir Kaupthing Bank enn einaferð um innlánsrentuna, sum bankin bjóðar kundunum.



# Klassiskt konsert

Sunnudagin 17. juni verður klassisk konsert í Norðurlandahúsinum við Nikolaos Kapnas á violin og Jóhannes Andreasen á klaver. Á skránni eru verk eftir Bach, Mozart og Beethoven. Nikolaos Kapnas er føddur í Taskjent í Usbekistan, men hevur búð í Føroyum síðani 1998 og starvast sum musikklærari, umframt at spæla konsertir. Jóhannes starvast í musikk-skúlaskipanini, men er eisini sera virkin tónleikari. Í fjør frumframførdi millum annað nýggj verk fyri soloklaver eftir Kára Bæk og Atla Heimir Sveinsson

# Bjørn Kals



*Tað eigur ongantíð at gerast so galið í Føroyum, at maður ikki kann kasta snørið út fyri Hólmafles, suður úr Glyvursnes ella innanfyri Høgnaboða – til húsbrúks*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum noyðist at taka onkrar ópopulerar avgerðir, nú toskastovnurin er á fallandi føti, og sakkunnleikin mælir til, at eingin beinleiðis veiða verður eftir toski í komandi fiskiári. Men hvørjar møguleikar hevur Bjørn Kalsø, og hvat kunnu vit vænta okkum av Føroya løgtingi í einum valári, sum kann ganga útyvir atkvøðuposan hjá teimum ráðandi**

HUGLEIÐING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað kann kanska tykjast undarligt, at tað serliga er toskurin, sum hevur tey stóru sveiggini og altíð hevur havt stór sveiggj í veiði. Vit plaga at siga, at toskur er "kanibalur" – at hann etur sítt egna avkom, um ov lítið er av føði. Hugsandi er sjálvsagt, at toskur eisini etur avkomið hjá øðrum fiski, um hann fær fatur á tí.

Ein orsøk til, at sveiggini í toskaveiðini eru so stór, er, at veiðitrýstið eftir hesum dýra fiskaslagi er so stórt.

Flest øll fiskifør, sum hava møguleikan til tess, vilja hava tosk, um tað yvirhøvur ber til. Tískil verður trýstið á stovnin alla tíðina optimalt.

Er minni toskur at fáa, verður bara fiskað eitt sindur harðari. Skip og bátar leggja seg meira á fiskin, og soleiðis gerst trýstið uppaftur harðari.

Sama er, tá talið av fiskidøgum verður skert. Tá vil veiðimaðurin eisini royna at gera tað betri – við meira línu og betri agni.

Soleiðis egna nógvir feska gággu, sum toskinum dámar væl.

Fyrr egndu flestu bátar í landi. Var línan egnd, men líkindi ikki vóru at loysa, tá dagurin leið, settu menn stamparnar í frystaran til næsta dag. Nú hava nógvir bátar trakt, haðani lína og húkar fara aftur ígjøgnum. Í traktini liggja nýggj og fesk øgn. Høgguslokkur, sauri og makrelur verða soleiðis ikki fryst uppaftur, men fara út við húkunum eftir fyrstu upptiðning – og gággan fer púrasta fesk á húkarnar.

## Innaru leiðirnar

Alt gott um, at útróðrarmenn vilja gera tað betri. Teir hava bát og útgerð at rinda, manning og familju at forsyrgja.

Hinvegin er spurningurin, um veiðiskipanin kann gerast betri, soleiðis at meira verður til allar, og vinnan gerst meira lønandi, bæði á sjógvi og landi.

Lína tekur nógvan smáfisk – ikki bara tí, at tað er lína, men eisini tí, at smáu útróðrarførini hava loyvi at royna í klettin.

Sakkunnleikin sigur, at lína sum heild fiskar smærri fisk enn eitt nú snella.

Vit hava dømir úr ringum fiskiárum, har stórur toskur kemur inn á firðir og sund at leita sær føði. Hetta sóu vit ikki minst tey árini, tá stovnurin var heilt illa fyri.

Innaru leiðirnar eru sambært fiskifrøðingum uppvakstrarøkið hjá ungfiski, og tí er hugsandi, at tá stórur toskur leitar á hesar leiðir – í størri mun enn vanligt – verður nógvur ungfiskur til toskaføði.

Onnur fyribrigdi, sum hoyra heima í náttúruni, síggjast um várið, tá toskur leitar á grynri vatn at gýta. Sama er, tá sildafiskur, sum hann verður róptur, kemur inn á vanligu sildafiskaleiðirnar.

Soleiðis eigur tað at vera, tá alt veit væl við hjá toskinum, og náttúran háttar sær, sum okkum dámar best.

Sildafiskur gongur eftir nebbasild, og tað er tá, vit plaga at síggja tey stóru fuglavaðini.